


**Nr. 17** ***14. august 2022*** **82. árg.**

# Nóa sá einki, men trúði

Nóa er ein einastandandi mynd uppá, hvat ið tað merkir at liva og handla í trúgv. „Nóa trúði Gudi, tá ið hann fekk ávaring um tað, sum henda skuldi, men sum **enn ikki var at síggja**.“ Hebr. 11,7 N.S. Har **sást** einki til, at ein vatnflóð fór at koma yvir jørðina. Harrin hevði sæð, at illskapur menniskjanna var mikil á fold, og at tær í hjarta sínum einans hugsaðu um at fremja illverk tann líðilanga dag. (1. Mós. 6,5) Soleiðis var tað tá.

Hvussu man støðan vera á jørðini í dag? Í 1. Mós. 2,5–6 stendur: „Tá ið Harrin hevði skapað jørð og himin, var als eingin runnur til, og ongar urtir vuksu enn, av tí at Harrin Gud enn **ikki hevði latið tað regna á jørðini**, og eingir menn vóru til at dyrka jørðina; men upp úr jørðini kom **kelda** og vætaði alla markina.“

Men Nóa bygdi eitt skip, hóast hann ongantíð hevði sæð regn. Gudfrøðingar halda, at hann bygdi ørkina í 120 ár, meðan hann støðugt segði síni samtíð um ta vanlukku, sum fór at koma yvir jørðina, og hann bjóðaði teimum at koma inn í ørkina, so tey kundu verða bjargað. Ørkin er ein mynd av Kristusi. Men so einaferð var tíðin komin at enda. **Síðsti** plankin var komin upp á pláss. – **Síðsta** djórið var komið umborð. – **Síðsta** ávaringin hevði ljóðað. – Nóa og hansara familja vóru tey einastu, sum tóku av innbjóðingini, og sum vildu koma við – og **Gud læt hurðina á ørkini aftur**. Ein dag er **endadagurin** eisini komin til okkara!

Síðani hendi hetta: „Tá ið sjey dagar vóru umlidnir, kom vatnflóðin yvir jørðina. Tað árið, tá ið Nóa bleiv 600 ár, tann 17. dagin í øðrum mánaði, á tí degi opnaðust allar **keldurnar**

í tí stóra djúpinum, og **lúkurnar** á himli lótust upp, og regnið streymaði niður á jørðina 40 dagar og 40 nætur."

Nóa handlaði í trúgv, hóast hann einki sá. (Lesið Matt. 24, Markus 13 og Luk. 21) Jesus ávarar okkum í Markus 13,23: „Men tit – varðið tykkum! **Eg havi sagt tykkum alt frammanundan**." Vit síggja øll teknini! Biðja vit? Bera vit okkum skilagott at? Eru vit til reiðar til fráferð? Endin kann koma brádliga!

*Effie Campbell* umsetti.

# Maran ata!

Vit liva hinumegin krossin og fullgjørda verkið. Vit hava hoyrt hin upprisna Kristus siga okkum, hvørji **tekn** og **hendingar** skulu siga okkum, at **Jesu koma er nær**. Vit hava í Luk. 21,28 hoyrt hann siga: „**Tá ið hetta fer at henda**, tá rǽttið ryggin og lyftið høvdum tykkara, **tá verða tit skjótt fríað**." N.S.

Vit hava hoyrt Jesus siga: „Á sama hátt skulu tit eisini vita, **tá ið tit síggja hetta henda**, at Guds ríki er í nánd. Sanniliga sigi eg tykkum: henda slekt skal als ikki forganga, áðrenn alt samalt er hent. Himin og heimur skulu ganga undir, men orð míni skulu als ikki forganga." (Luk. 21,31–33).

Nóa sá einki tekn, men hann trúði! Vit síggja øll teknini rulla inn yvir okkum – sum verkirnir hjá konu, sum er komin á soppin!

Men trúgva vit? Eru vit ovurfegin? Siga vit øðrum frá um Frelsaran? Gleða vit okkum til komu Jesusar? Eru vit til reiðar til burturrykkingina? Tí hon kemur uttan fyriboðan.

Eg sigi: „Maran ata!" (1. Kor. 16,22). Tað merkir: „Kom, Harri Jesus!" (Opb. 22,20).

*Effie Campbell* umsetti.

# Eg eri leyskeypt!

„Tit vita, at tit vórðu ikki **leyskeypt** frá tykkara innantóma lívi, sum tit høvdu frá fedrunum, við forgeingiligum silvuri ella gulli, men við dýra blóði Krists sum blóði av einum ósekum offurlambi." 1. Pæt. 1,18 N.S.

„Hann (Kristus) gekk inn í tað allarheilagasta eina ferð fyri alla tíð; ikki við blóði av einum djóri, men við sínum egna blóði og gav okkum æviga loysn." Hebr. 9,12 N.S.

Einaferð bleiv ein óður hundur beittur eftir einum kristnum manni. Tað var í Mexico. Hann var farin út at boða evangeliið.

Nøkur ónd fólk høvdu viljað, at hann varð skræddur sundur. Hundurin leyp á hann. Hann var eitt rættiligt rovdýr. Fyltur við Guds Anda skríggjaði maðurin: „JESU BLÓÐ!“

Hundurin small deyður niður.
Tað er kraft í Jesu navni!
Tað er kraft í Jesu blóði!
Sig: **Eg eri leyskeypt**!
Hvat var prísurin: Blóðið!
Tá ið djevulin er eftir tær við óndum lystum og tonkum, so minn hann á blóðið, sum bleiv givið sum loysigjald. Hann veit, hvat ið hatta blóðið hevur at týða.
Tað merkir: **Eg eri leyskeypt! Halleluja!**

*John Osteen – Effie Campbell* umsetti.

# Mítt skýggj av vitnum

*Siri Iversen*

„Latum tí okkum eisini, við tað at vit hava slíkt stórt skýggj av vitnum uttan um okkum, seta av okkum eina og hvørja byrði og syndina, sum lættliga darvar, og við treysti renna tað skeið, sum okkum er fyri sett, við tað at vit líta til upphavsmann og fullkomnara trúarinnar, Jesus.“ Hebr. 1,1–2.

Vit hava øll okkurt, sum tyngir. Øll mugu viðhvørt stríðast móti møði og mótloysi. Summi droyma um eitt lív, har alt riggar: samstarvið er lýtaleyst, arbeiðið er frálíkt, heilsan er góð, útbúgvingin er hin rætta, og kroppurin er flottur. Alt er bara frálíkt. Men tað er nú so, at tað lýtaleysa og fullkomna lívið er ikki til.

Tá ið mótgangur og ivin koma, fáa vit tey ráðini at líta upp á Jesus, tí Hann hevði ikki nakað lætt lív. Hann kendi til pínu og var órættvíst viðfarin.

Sambært Hebrearabrævinum er skýggið av vitnum øll tey fólkini, sum eru farin undan okkum og eru deyð í trúnni á Jesus, og hvørs lív framvegis talar trúgv inn í mítt lív eftir deyða sín. Og tey eru nógv í tali, men her skal eg bara nevna eina konu, sum gav Gudi sínar samanspardu pengar.

Eg veit ikki, hvat ið hon æt. Hon var gomul og búði uppi á einum lítlum lofti í Oslo í 1930-árunum. Hon bað nógv, og ein

dag varð hon mint á at geva allar sínar samanspardu pengar til Betlehem Misjonsmenighet. Hon hevði onga eftirløn. Hetta var alt, hon hevði at liva fyri.

Prestur hevði biðið Gud um pengar, so tey kundu seta ein trúboðara, og so hevði hann givið Gudi eina freist. Hann sat á skrivstovu síni og hevði hug at blaka alt frá sær, tá ið eingir pengar komu. Tá kom ein lítil drongur rennandi. Hann var sendur ørindi fyri hesa konuna. Drongurin rætti presti ein brævbjálva við akkurát tí peningaupphædd, sum prestur hevði biðið um.

Trúboðarin var Frank Mangs. Hann kom til Oslo og bleiv amboðið til eina víðfevnda veking, sum Oslo neyvan hevði sæð makan til, hvørki undan ella seinni. Fólk blivu frelst í hópatali. Men vekingin byrjaði við konuni, sum eingin kennir navnið á, men sum gav alt, hon hevði.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tað, sum vit fylla okkum við dagliga, kemur at ávirka okkara hug og hjarta. Vit kunnu ikki liva eitt dupult lív, har vit viðhvørt liva saman við Jesusi og aðrar tíðir liva, sum okkum lystir. Bíblian er greið. Vit kunnu ikki tæna tveimum harrum.

*e.c.* ums.

---

Um tú hevur runu og skitt í tínum glasi, so fært tú ikki reint vatn, tá ið tú hellir nýtt vatn uppí. Tú mást fyrst vaska glasið. Á sama hátt er tað við okkum. Tað nyttar einki, at vit byrja at pynta upp á okkum. Nei, vit mugu fyrst venda um og bjóða Jesusi inn í okkara hjarta sum Harra og Frelsara. Tá reinsar hann okkum í blóði sínum, og vit verða hvítari enn kavi.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21. aug. | **Tekstur:** Mark. 10,13-16 | | **Bíbliuorð:** Mark. 10,14b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




Nr. 18 *28. august 2022* 82. árg.

# Kendur, kallaður og gjørdur øðrvísi

*„Eg myndaði teg ... Eg kendi teg ... Eg halgaði teg ... Eg setti teg til.“ Jer. 1,5.*

Hoyr: „Áður enn eg myndaði teg í móðurlívi, kendi eg teg, áður enn tú komst av móðurfangi, halgaði eg teg; til at vera profet tjóðanna havi eg sett teg.“ Jer. 1,5. Hoyrdi tú tað? Hann kendi teg, Hann halgaði teg og gjørdi teg til okkurt. Hugsa nú um hatta eina løtu.

***1.*** Hann kendi teg! Orðið „kenna“ merkir „at hava djúptøknan kunnleika um“. Tá ið tínir skirvisligu fingrar bara vóru eitt net, áðrenn hjartaslátturin kundi mátast, ella læknin kundi siga, um tú vart drongur ella genta – tá kendi Gud teg!

Dávid segði: „Forløg míni eygu tíni sóu, og í tína bók vórðu skrivaðir allir teir dagar, ið avmáldir vóru, áður enn nakar av teimum var til.“ Sálm. 139,16. Gud visti, hvat ið tú skuldi føðast til at blíva, og Hann hevur sæð til, at tú hevur fingið alt tað, tær nýtist, fyri at tú skalt gerast júst tað! Sum tað er undurfult!

***2.*** Hann halgaði teg! Menniskju kunnu útnevna; men bara Gud kann halga frammanundan! Gevst tí at gremja teg um, hvør ið sær tíni evni, og hvør ið ikki ger tað. Gud sigur: „ ... far allar staðir, hvar eg so sendi teg, og tala alt tað, sum eg bjóði tær. Óttast teir ikki, tí at eg eri við tær til tess at frelsa teg, sigur Harrin.“ Jer. 1,7–8. Hvør kann biðja um meir?

***3.*** Hann skapti teg! Gud sigur: „Eg skapti teg, so tú ikki hóskar hvar sum helst. Eg evnaði teg til, so at tú ikki fert at kenna teg væl til passar í øðrum enn tí, sum eg ynski fyri teg.

Eg vildi, at tú skuldi villast, til tú fanst meg. Tí kennir tú teg ikki væl til passar á ávísum støðum og nær ávísum menniskjum. Tað ger ongan mun, hvussu ofta tú roynir, tí eg skapti teg øðrvísi – skapti teg til okkurt betri. Ert tú ikki glaður, at tað er so?

*„... et Ord til dagen“ – Effie Campbell* umsetti.

# Trúgv á Harran Jesus, og tú skalt verða frelstur og hús títt

*(Áps. 16,31).*

Tá ið prestur er liðugur við talu sína, og trúboðarin við bíbliutíman, tá ið síðsta reglan í sálminum er sungin, og samrøðan er at enda komin í einari húsavitjan, ella at teologiprofessarin er liðugur við fyrilesturin, so er tað ein setningur, sum má standa eftir sum ein felagsnevnari fyri alt, sum hevur verið sagt: Trúgv á Harran Jesus, og tú skalt verða frelstur.

Sami setningur kann sigast upp á ymsar mátar, men boðskapurin er hin sami. ***Bíblian sigur hetta upp á óteljandi mátar:***

- Haldið tykkum nær at Gudi, so skal hann halda seg nær at tykkum. *Ják. 4,8.*
- Tíðin er fullkomin ... Vendið um og trúgvið gleðiboðskapinum! *Mark. 1,15.*
- Tann, ið trýr og verður doyptur, skal verða frelstur. *Mark. 16,16.*
- Óttast ikki; trúgv eina, so skal hon verða bjargað!“ *Luk. 8,50.*
- Tann, sum trýr á sonin, hevur ævigt lív. Jóh. 3,36.
- Tann, sum á meg trýr, skal aldri tysta. *Jóh. 6,35.*
- Ábraham trúði Gudi, og tað varð roknað honum til rættferðar. Ják. *2,23.*
- Tann, sum trýr á hann, skal ikki verða til skammar. Róm. *10,33.*
- Trúgv tín hevur frelst teg; far tú í friði! *Luk. 7,50.*
- Tí av náði eru tit frelstir, við trúgv. *Ef. 2,8.*

Innihaldið er hitt sama, sjálvt um skriftstøðini ljóða ymiskt. Boðskapurin er hin sami og stígur fram annaðhvørt sum eitt lyfti ella sum ein áheitan at taka ímóti.

Jesus doyði á krossinum fyri teg, so at tú kanst fáa lut í tí æviga lívinum.

Jesus varð revsaður fyri teg, so at tú skuldi sleppa undan revsingini!

Gud rýmdi frá Jesusi, so at Gud ongantíð skal rýma frá tær! Hann bíðar eftir tínum svari í dag!

*Effie Campbell* umsetti.

# Frelsan

*Frelsan er gjørd so einføld, at sjálvt ikki dárin skal villast. (Jes. 35,8).*

Skriftin sigur: „Og tað skal verða, at hvør tann, sum ákallar navn Harrans, skal verða frelstur." (Áps. 2,21).

Vilt tú verða frelstur, rópa so á Jesu navn. Bíblian veit frá fleiri persónum at siga, sum gjørdu tað, t.d. tollarin í templinum. Hann sló seg fyri bringuna og segði: „Gud náði meg syndara!" Jesus segði, at hann fór rættvísgjørdur, tað vil siga frelstur, heim til húsa. (Luk. 18,13–14).

Ein annar persónur var ránsmaðurin á krossinum. Eisini hann ákallaði Jesu navn. „Jesus, minst tú til mín, tá ið tú kemur í ríki títt!" bað hann. Og straks fekk hann svar: „Sanniliga sigi eg tær, í dag skalt tú vera við mær í páradís!" (Luk. 23,42–43).

Frelsan er ongantíð longur burtur enn eitt róp.

*Effie Campbell* umsetti.

# Samkensla við teimum faðirleysu

Nakrir studentar fóru umborð í eina ferju einastaðni á Vesturlandinum í Noregi saman við nógvum øðrum ferðafólki. Teir vóru yvirkátir og forherðaðir, og á ferðini hildu teir alt og øll fyri gjøldur. Ein ráur látur rungaði í heilum út yvir salónina.

At enda sóu teir ein stillføran mann, sum stóð fyri seg sjálvan.

„Her hava vit eitt hóskandi „offur"," hugsaðu teir. Tískil savnaðist alt harkaliðið kring henda fremmanda uttan at vita, at hann var ein trúgvandi maður. Ein teirra vendi sær til hansara og setti honum framligur henda spurning: „Sig mær, hevur tú hoyrt nýggjastu tíðindini?"

„Nei,“ svaraði maðurin, meðan hann hugdi upp á drongin, álvarsliga og spyrjandi.

„Satan er deyður!“

Tá gjørdist maðurin uppaftur álvarsligari. Sinniliga treiv hann niður í lumman og fann fram ein mynt, sum hann rætti tí bilsna ungdóminum.

„Hví gevur tú mær pengar?“ spurdi drongurin týðiliga ørkymlaður.

Maðurin svaraði: „Jú, veitst tú, eg havi altíð havt samkenslu við teimum faðirleysu...“

**Hvat sigur Orðið**: „Tit hava djevulin til faðirs, og tað, sum **faðir tykkara** lystir, vilja tit gera. Hann var manndrápari frá upphavi og stendur ikki í sannleikanum, tí at sannleiki er ikki í honum; tá ið hann talar lygn, talar hann av sínum egna, tí at hann er lygnari og **faðir at lygnini**.“ Jóh. 8,44.

„Men hetta skalt tú vita, at á síðstu døgum skulu koma torførar tíðir; tí at menniskjuni skulu vera sjálvkær, peninga-gramm, reypsom, hástór, spottsom ... **uttan virðing** fyri tí heilaga.“ (Norsk ums. 2. Tim. 3,1–2).

„Men tit, elskaðu, minnist til tey orð, sum áður eru talað av várs harra Jesu Krists ápostlum. Tí at teir søgdu tykkum: Í síðstu tíðum **skulu koma spottarar**, sum ganga eftir sínum egnu gudloysis girndum.“ Judas 1,17–18.

„Villist ikki! **Gud letur seg ikki spotta**; tí at tað sum maður sáar, tað skal hann eisini heysta.“ Gal. 6,7.

*„Tro & Fakta“ – Effie Campbell* umsetti.

---

At tykja synd í sær sjálvum er hin ringasti fíggindin ein kristin hevur at berjast ímóti. Um tú vilt missa kraftina at sigra, so byrja at tykja synd í tær sjálvum.

*e.c.* ums.

---

Hin moralska kumpasnálin hjá menniskjum sveiggjar uttan nakra fasta leið.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 28. aug. | **Tekstur:** | Luk. 8, 40-42 + 49-56 | **Bíbliuorð:** | Luk. 8,50b |
| 4. sept | **Tekstur:** | Jóh. 6,1-15 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 6,35 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74